# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Nikala Jensen 90 ár

Leygardagin 3. september verður Nikala Jensen Sumba 90 ár. Stóra dagin heldur hon hjá dóttrini í Vági, saman við børnunum.



Kala, sum hon vanliga verður nevnd, er ættað úr Kálvhúsinum á Glyvrum. Foreldrini hjá Kalu vóru Martin Vang av Glyvrum og Sunneva, sum var úr Sumba. Tey bæði fingu níggju børn - sjey gentur og tveir dreingir. Okkara millum nú, eru bert tær fýra - Svanhilda og Diny, sum búgva í Eysturoynni - Cecilia og Nikala, sum búgva í Sumba.

Kala kom suður til Sumbiar, til ommuna í Kálgarði at búgva, bert 9 ára gomul. Í Kálgarði var nógv at takast við. Tað var jú bóndahús, og so høvdu tey eisini telefonstøð har. Serliga hetta við telefonstøðini var orsøkin til, at Kala kom suður at búgva. Hon slapp at ganga við telefonboðum, og alt sum hartil hoyrdi.

Tey vóru ógvuliga góð við hana í Kálgarði. Serliga minnist hon, hvussu góður Tummas í Kálgarði var við seg. Hann var ungur drongur, eini 18 - 20 ára, tá hon kom suður. Hon minnist, at tað fyrsta hann gjørdi, tá hon var komin, var at fara til handilsmannin at keypa køkur.

Tvey ár gingu, til Kala fór norður aftur til Glyvrar at vitja, men so gott hevði hon havt tað í Sumba, at hon vildi sleppa suðuraftur.

Hon minnist enn, fyrstu telefonboðini hon fór við. Tað var longu dagin eftir, hon var komin til Sumbiar. Tað varð lagt henni eina við at siga rætta navnið á konunu, sum boðini vóru til, og ikki eyknevnið. Tey søgdu henni, hvar konan búði, og so fór hon avstað. Tá hon kom niðan móti húsunum, har konan búði, fór vindeygað upp, og ein kona spurdi, um telefonboð vóru til sín. Eg veit ikki, segði Kala, men telefonboð eru til Sunnevu Katrinu.

Kala minnist eisini mangan ungan sjeikin, sum so smæðin kom til hennara og bað hana ringja upp til unnustuna, sum kanska búði í aðrari bygd.

Eisini var tað mangan soleiðis, at fólk komu til hennara, og bóðu hana ringja til lækna fyri seg. Hon tosaði so við læknan fyri viðkomandi, og segði, hvat var áfatt. Oftast var læknin dani, so hetta mátti vera á donskum.

Kala varð gift í 1941 við Johannes Jensen úr Sumba. Tey fluttu saman í barnaheimið hjá Johannesi, har Kala býr enn. Johannes doyði fyri tíggju árum síðani. Tey fingu seks døtur, harav tvær doyðu sum smágentur. Hinar eru: Greta, sum býr á Tvøroyri, Mathea, sum býr í Glostrup, Jonna, sum býr á Tvøroyri og Magna, sum býr í Vági.

Ommubørnini eru níggju og langommubørnini tíggju.

## Andlát og jarðarferðir

**Karolina Johannesen,** Tvøroyri, andaðist týsdagin 30. august, 87 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju leygardagin 3. september klokkan 13.00. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Karolinu kunnu lata Missiónshúsinum á Tvøroyri eina gávu. Konta í Føroya Banka.

**Margun Nørgaard,** fødd Hammer, andaðist á Kolding Sygehus hósdagin 1. september, 40 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Niels Jacob Niclasen**, ættaður úr Nesi í Hvalba andaðist mikudagin 31. august, 53 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapllinum leygardagin klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini.

**Sigrid Petrine Andreasen**, ættað úr Fuglafirði, búsitandi á Akranesi í Íslandi, andaðist týskvøldið 30. august, 65 ára gomul.

Jarðarferðin verður lýst seinni.

## Til Kalu-ommuna á níti-ára degnum



Omman hevur altíð verið bæði blíð og tíð at koma inn til. Ikki var ein meir enn komin inn um dyrnar, so varð dekkað borð við fínasta stelli og heimabakaðum drýli og trumfi. Svangur mátti man ikki verða. Tá so etið var, ja so skuldi man spæla kort. Vóru tað bara vit báðar, so spældu vit Túsund, og ofta komu Alma og Erna á gátt. Vóru vit fleiri, so spældu vit Sjavs. Hetta við kortum og spæli hevur altíð verið eina partur av tí at vera hjá ommuni.

So leingi eg kann minnast, eri eg komin nógv hjá ommuni og abbanum. Til eg var eini 13 ár, var eg har hvørt vikuskifti. Eg hjálpti teimum at gera reint og keypa inn, men ongantíð skuldi eg gera ov nógv. Eitt gólv at støvsuga ella vaska, tað var nokk.

Einaferð keypti omman eitt spæli-bingo, og hetta hugnaðu vit okkum nógv við. At ommuni dámar at spæla bingo, vita ivaleyst tey flestu her um leiðir, tí omman er fastur fúsur á bingo, tá tað er.

Altíð hava tey verið góð við okkum børn. Abbin segði altíð frá søgum. Tá hann var undir Íslandi og í Onglandi. Hetta elskaði eg; at sita hjá abbanum og lurta, meðan hann trallaði, sum eg kallaði tað.

Tá so farið varð til songar, svav eg altíð hjá ommuni. Har bóðu vit altíð Faðir Vár, og omman las úr Lestrarbókini.

Nú, omman verður 90 ár, eru uttan iva nógvar søgur at siga frá og nógv minnir í huganum. Og enn er tað líka hugnaligt at sita og lurta eftir, tá hon sigur frá.

Góða omman; minnini eru nógv, og nógv er at vera takksom fyri. Og tú skal vita, at minnini um mín barndóm í Sumba og eisini seinni, nú eg eri vorðin vaksin, verða aldrin gloymd. Tú hevur enntá verið og vitjað meg í Keypmannahavn 88-ára gomul. Ikki eru nógv, ið kunnu siga tað.

Ongin hevur haft betri ommu enn eg. Takk fyri alt!

**Karla**

Kunngjørt verður at kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Edvin Olsen,**
**ættaður úr Hósvík,**
**búsitandi í Vestmanna,**

andaðist fríggjamorgunin, 87 ára gamal.

Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

*Familjunnar vegna,*
**Hanna, Leivur, Lisbjørg og Brynhild**

Kunngjørt verður, at kæri maður mín, pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Sverre Vilhelm**
**Klaksvík**

andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi mikumorgunum 31. august, 79 ára gamal.

Kistan fer av kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi sunnudagin kl. 16, heim í Christianskirkjuna.

Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni mánadagin 5. september kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Asta,**
**Atli, Jensa og Esta**